# Eitt spøkilsi í mínum lívi

Fyri hálvum triðja ári síðani varð Agnar Ellebye Andersen úr Klaksvík funnin tíðliga ein sunnumorgun uttan fyri íbúðina hjá sær í Svendborg við ógvusligum skallabrotum. Hann minnist onki til hetta. Hóast hann í dag hevur góðtikið, at hann ongantíð finnur út av tí, spøkir tankin, um hvussu hann fekk skaðarnar, javnan aftur



SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Ollerup:** Klokkan er eitt um náttina, sunnunáttina tann 24. november 2002. Agnar Ellebye Andersen stígur út úr reyða bilinum hjá einum starvsfelaga, sum koyrir hann heim. Tey hava verið úti og etið saman við starvsfeløgunum á einum tónlistarligum eftirskúla í Svendborg.

Klokkan er nú hálvgum seks sama morgun, og Turid, kona Agnar, vaknar á sofuni framman fyri sjónvarpinum. Hon reisist. Agnar er ikki komin heim enn. Hon fer yvir ímóti vindeyganum og hyggur út.

Agnar stendur mitt í garðinum. Han klárar nóg illa at standa. Blóðið rennur frá høvdinum og niður eftir skjúrtuni hjá honum. Turid ber skjótt at. Hon fer eftir Agnari og fær hann inn um dyrnar. Beint áðrenn hann missir vitið aftur, hyggur hann upp á hana og sigur:

" Eg elski teg."

Agnar verður fluttur á sjúkrahúsið í Svendborg, har ógvuslig skallabrot verða staðfest, og at hondin eisini er illa brotin.

Læknajournalin vísir, at Agnar hevur heili tíggju brot ymsastaðni á høvdinum. Stórar blóðsamlingar eru fleiri staðni á høvdinum og væta setur stórt trýst á heilan. Hann er í lívsvanda og verður fluttur á sjúkrahús í Odense. Læknar eru allatíðina tilreiðar at seta hol á, um trýstið skuldi blivið ov nógv. Tað er ikki vist, at Agnar yvirlivir, so Turid verður biðin um at boða familjuni frá. Hon fær eisini tey boð, at um hann yvirlivir, verður hann heilaskaddur fyri lívið.

## Mín kroppur

Men Agnar vil tað øðrvísi. Hann liggur á intensivari deild í Odense í tríggjar dagar, áðrenn hann verður mettur ikki at vera í lívsvanda longur. Hann verður so fluttur aftur til Svendborg. Hann dugir onki. Kann ikki fara á wcið sjálvur, fáa sær at eta sjálvur ella nakað annað, sum hann áðrenn tilburðin tók sum givið. Tónleikurin, sum fyllir sera nógv í hansara lívi, verður settur til síðis í eina tíð. Tað er ikki hugsingur um hjá honum at spæla trompet ella guitar. Tað hevur hann ikki motorik til. Men við uppafturvenjing á einari deild í Ringe og einum góðum vilja, kemur Agnar seg skjótt. Í dag merkir hann onki til skaðarnar, sum hann fekk fyri hálvum triðja ári síðani.

- Tað er líka handliðið, sum kann gera eitt sindur fortreð av og á, men annars merki eg onki, sigur Agnar.

Hann heldur ikki, at tað veruliga gekk upp fyri honum, hvussu álvarsom støðan var, tá hann fekk boðini á sjúkrahúsinum.

- Eg hugsaði sum so, at tað kann væl vera, at tey halda, at tað stendur so illa til. Men tað var eg, sum var í mínum kroppi, og eg merkti ikki, at tað var so álvarsamt.

Heimaftur komin, gekk tað veruliga upp fyri honum, hvussu álvarsamt tað var og kundi verðið.

– Á sjúkrahúsinum var eg vanur við, at alt gekk sína føstu gongd, men tá eg kom heimaftur, sá eg, hvussu torført eitt nú Turid veruliga hevði havt tað av hesum. At hon stóð til at skula standa púra einsamøll um alt ella við einum, sum ikki kundi brúkast til nakað, sigur Agnar, sum til tíðir var sera troyttur av at vera sjúklingur. Allatíðina at fáa at vita, at hann mátti hvíla seg og ikki gera ov nógv, varð til tíðir ov nógv av tí góða hjá honum.

- Eg kendi meg minni verdan, tí eg ikki bara kundi reisa meg og gera tað, sum mær lysti. Men eg byrjaði í smáum við at taka eina hond við í matgerðini ella uppvaskinum. Tað vóru smá stig, greiðir Agnar frá.

## Ólekkurt ikki at vita

Agnar veit ikki, hvat hendi hasa náttina og hevur sligið seg til tols við, at hann helst ongantíð finnur út av tí. Men kortini spøkir tankin oftani aftur í høvdinum á bæði honum og Turid

"Hvat mundi veruliga henda frá tí, at Agnar steig út úr bilinum um eitttíðina, til Turid sá hann í garðinum klokkan hálvgum seks sunnumorgunin?"

Í einari roynd at endurskapa støðuna, hava Turid og Agnar roynt at gitt seg fram til, hvat hendi.

Tá Turid fann Agnar lógu lyklarnir til úthurðina beint við hurðina. Jakkin vendi á ranguni og lá í túninum og við síðuna av honum sigarettirnar.

- Útfrá hesum gita vit okkum til, at eg eri komin til úthurðina og eri í ferð við at læsa meg inn, tá onkur tekur í meg aftanífrá og skræðir jakkan av mær, greiðir Agnar frá.

Meðan Agnar var til uppafturvenjing í Ringe, hugsaði hann nógv um hesa vanlagnunátt. Men óansæð hvussu hann so vendi og snaraði tí, minnist hann ikki longur enn til, tá hann steig út úr bilinum.

- Tað er ólekkurt ikki at vita, hvat hendi, sigur tónleikalærarin róligur á málinum og leggur afturat, at hann droymdi ofta um tilburðin fyrstu tíðina aftaná.

Í dreymunum verður hann